NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

P/F Havnar Timburhandil 75 ár:

Reistist aftur úr øskuni

Fríggjadagin 31. oktober, varð móttøka hjá P/F Havnar Timburhandli á Hálsi í sambandi við at 75 ár eru liðin síðan fyritøkan var stovnað. Umleið 250 fólk stukku inn á gólvið hendan dagin

Heini Fosaa, stjóri í Havnar Timburhandli og Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka
Mynd: Jens Kr. Vang

Fyri at markera at 75 ár vóru liðin, síðan P/F Havnar Timburhandil varð stovnaður tann 8. august 1928, var móttøka í Hálsi seinasta fríggjadag.

Eisini eru 25 ár liðin síðan fyritøkan flutti av keiini og niðan á Háls.

Eftir størsta eldibrandin í Føroya søgu, 19. desember 1987, tá Havnar Timburhandil brann í grund, reistist fyritøkan aftur og er í dag ein stór fyriutøka við fleiri deildum og døtturfeløgum.

Í øllum deildum og dóttirfeløgum eru í dag umleið 70 starvsfólk. Stjórar í P/F Havnar Timburhandli eru Heini Fosaa og Jógvan Jørgensen.

Til móttøkunu seinasta fríggjadag komu viðskiftafólk, samstarvsfelagar og onnur inn á gólvið.

Jenny Fosaa, kona fyrrverandi stjóran, Eivind Fosaa, og mamma núverandi stjóran Heina Fosaa
Mynd: Jens Kr. Vang

Magnus Magnussen, el-innleggjari og Jógvan Jørgensen, stjóri í Havnar Timurhandli
Mynd: Jens Kr. Vang

Jan á Argjum, frá Havnar Timburhandli, saman við Bent á Lava og Eyðun Hansen frá Balslevs Timburhandli
Mynd: Jens Kr. Vang

Pauli Ellefsen, Sverri Hansen og Heini Fosaa
Mynd: Jens Kr. Vang

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Thomas Lenvig 80 ár

Sunnudagin 2. nov. fylti Thomas Lenvig í Klaksvík 80 ár. Thomas er læraralærdur, og hann var lærari í Klaksvík fram til í 1987, tá ið hann fór úr starvi. Hann er framvegis byrgur og sæst ofta við súkkluni á veg heim í býin ella út eftir Oyravegnum. Ofta er hann eisini á ferð til og úr høvuðsstaðnum, har hann vitjar í sambandi við skrivligt arbeiði, sum hann framvegis fæst við.

Thomas Lenvig er ættaður úr Hesti. Foreldrini vóru Hans Frederik Lenvig í Hesti, og Súsanna Malena, sum var fødd Joensen og ættað úr Nólsoy. Thomas leyk prógv á Føroya Læraraskúla í 1946. Tvey tey fyrstu árini var hann lærari í Bø og í Gásadali, eitt stutt skifti var hann lærari í Leynum, og frá 1950 og til í 1956 starvaðist hann í Norðdepli. 1. september í 1956 varð hann settur í fast starv í Klaksvík, har hann eisini hevði verið 1948-49.

Síðani Thomas legði lærarastarvið frá sær í 1987, hevur hann ikki ligið á tí løtu síðuni. Hann hevur hildið fram við mentunararbeiðnum, sum hann hevði fingist við, meðan hann var lærari. 1977-78 hevði hann verið á ársskeiði á Føroya málsdeildini, og síðani las hann til exam. art í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum. Seinni fór hann undir høvuðsgreinalestur á Føroyamálsdeildini, og í 1991, tá ið hann var 68 ára gamalur, tók hann cand.phil prógv. Í 1995 gav hann út ritgerðina Fyrsta føroyska skaldsøgan. Regin í Líð: Bábelstornið, og í sambandi við ritgerðina læt hann keldusavnið Frælsmannamál – blaðgreinir, fólkafundir, røður prentað og geva út.

Umframt at undirvísa í fólkaskúlanum, undirvísti Thomas Lenvig 1958-68 í Klaksvíkar Handilsskúla, og hann luttók í mentunarlívinum í Klaksvík. Eitt nú hevur hann spælt sjónleik. Seinasta ferðin, hann stóð á palli, mundi vera, tá ið klaksvíkingar miðskeiðis í seksti árunum spældu Magnus á loftinum í Føroya Banka. Saman við øðrum tók Thomas Lenvig í 1959 stig til at geva Hugnalig jól út. Umframt hann vóru tað John Reid Bjartalíð, Óli Dahl, Alex Sólstein og Johan Nielsen, sum tá var prestur í Klaksvík, ið stóðu fyri útgávuni av jólablaðnum, ið kom út 25 ferðir.

Í 1965 kom Aftursagnarbókin, sum Thomas hevði fyrireikað saman við øðrum, og í 1972 gav hann út savnið eftir S. M. Zachariasen: Ein yrkjari á útoyggj. Í 1994 skrivaði hann minningarritið Norðoya Sparikassi 75 ár.

Thomas Lenvig giftist í 1949 við Maluni, fødd Zachariasen. Hon var úr Klaksvík. Foreldrini vóru Símun Petur Zachariasen, sum var ættaður av Kirkju og var lærari í Klaksvík, fyrsti stjórin í Norðoya Sparikassa og løgtingsmaður, og Cathrine Maria, sum var av Dalinum í Klaksvík. Malan og Thomas bygdu omanfyri hjá foreldrum hennara úti í Grøv. Tey fingu tvær døtrar – Súsanna og Mildrid. Tað var ein dyggur smeitur hjá Thomasi, tá ið hann fyrst misti konuna og síðani yngru dóttrina. Súsanna er gift við Bjørn Kastalag, og tey búgva í Klaksvík.

Verfaðirin var ein av fleiri brødrum, sum vóru frammarlaga í Sjálvstýrisflokkinum. Thomas hevur altíð verið og er framvegis íðin sjálvstýrismaður. Hann hevur verið virkin í Sjálvstýrisflokkinum. Tá ið flokkurin 1963-66 var partur av sjálvstýrissamgonguni, sum fyrsta samgongan millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Framburðsflokkin hjá Kjartani Mohr varð nevnd, var Thomas Lenvig blaðstjóri á Tingakrossi, umframt at hann var lærari.

Magnus Kjelnæs heiðraður av drotningini

Í sambandi við at Magnus Kjelnæs í Klaksvík tann 1. november 2003 hevði arbeitt hjá Føroya Bjór í 50 ár, var samkoma hildin á fyritøkuni saman við starvsfólkunum seinasta fríggjadag.

Á samkomuni helt Magnus sjálvur talu, har hann segði frá um tíðina, hann hevði arbeitt á fyritøkuni og tær ómetaliga stóru broytingarnar, sum vóru farnar fram hesi árini.

Stjórin á Føroya Bjór, Einar Waag, segði eisini nøkur orð og handaði honum gávu frá fyritøkuni og eina »belønningsmedalje« sum hann hevði fingið frá drotningini fyri langa og trúgva tænastu.

Magnus fekk eisini gávur og heilsanir frá starvsfólkunum.

Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, hevur her handað Magnusi Kjelnæs »belønningsmedaljen« frá Margrethu drotning fyri langa og trúgva tænastu

Dagurin

4. november. Otto. Ivingarsamt er hvør hesin Otto er, men líkt er til, at sipað verður til biskupin Otto úr Bamburg, sum doyði í 1139.

Navnið et týskt og merkir *ríkidømi.*

Nøvn í vikuni

Kennir tú onkran …

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:.....
Bústaður:.....
Bygd/býur:.....Tel:.....
Evt. arbeiðspláss:.....

Merkisdagurin er: .....

Innsendari: .....Tel:.....

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 341800/216135, fax 341801, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo